VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið



Veðrið í morgin:
Fleyr til gul av útnyrðingi og vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 3 og 6 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Gul til stívt andøvsgul av vestri og útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 4 og 7 stig.



Veðrið leygardagin:
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og regn av og á. Hitin millum 5 og 8 stig.

Veðrið sunnudagin og mánadagin:
Sunnudagin lot av ymsum ættum og yvirhøvur turt. Hitin um 6 stig. Mánadagin veksur hann vindin upp í hvassan vind av landnyrðingi og ælingur, partvís kavi. Hitin fellur niður til frostmarkið.

Endabresturin við Frændum

-Vit fara at gera nógv burturúr, og vit vóna, at kvøldið í REX verður nakað heilt serligt, eftirsum tað er fyrstu ferð, at vit framføra í REX, sigur Eyðun Nolsøe, ein av Frændunum.

Seinasta vikuskiftið í februar bjóðar til tvær konsertir við Frændum, og menninir í bólkinum havi stórar vónir fyri endabrestinum. Við framførslum í REX og Mentanarhúsinum í Fuglafirði, trína Frændur á pall fyri seinastu ferð – í øllum førum í hesum umfarinum.

Teir framførdu kring landið í fjør í samband við 25 ára hátíðarhaldið og nýggjastu útgávuna Frændur V, men fyri framman eru tær seinastu konsertirnar á hesum sinni við Frændum

-Hetta verða seinastu konsertirnar í fyrstu atløgu, men vónandi verður okkurt á skránni aftur í summar, sigur Eyðun Nolsøe.

Ætlanin var upprunaliga, at konsert skuldi verða við Frændum i Mentanarhúsinum í fjør, men vegna illveður var konsertin avlýst. Avgerð varð beinan vegin tikin um, at konsertin skuldi haldast seinni.

-Vit vóru ómetaliga keddir av, at konsertin bleiv avlýst í Mentanarhúsinum, og tí vilja vit nú halda okkara lyfti til Eysturoyingar, sigur Eyðun Nolsøe.

Fríggjakvøldið 27. februar verður eisini fyrstu ferð nakrantíð, at Frændur framføra í REX.

- Vit hava gjørt serliga nógv burturúr konsertini í REX, tí hetta er fyrstu ferð, at vit framføra har, og vit vilja gera hetta til eitt heilt serligt kvøld, sigur Eyðun Nolsøe.

Atgongumerki til báðar framførslurnar kunnu keypast á ebillett.fo.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	-6
Nuuk	-3
Qaqortoq	9
Ammassalik	1
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	5
Seyðisfjørður	2
Tórshavn	4
Lerwick	5
Aberdeen	3
London	4
Tromsø	-1
Bergen	2
Oslo	-6
Stokkhólm	-2
Keypmannah.	-1
Helsinki	-2
Moskva	-13
Berlin	-4
Warzawa	-6
Kiev	-12
Bukarest	-6
Paris	5
Madrid	9
Róm	10
Malorca	14
Athen	10
Malta	13
Tunis	15
Beijing	4
New Dehli	23
Bangkok	32
Jakarta	30
Sydney	--
New York	0
Miami	15
Los Angeles	13
Meksikobýur	--
Panama	31
La Paz	15
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	25

LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:



Komandi nátt:



Síðstu nátt:
Eitt hátrýst, 1026 hPa. í útsynning úr Føroyum stendur mestsum í stað og gevur framvegis góðveður á okkara leiðum.

Komandi nátt:
Hátrýstið í útsynning úr Føroyum fer spakuliga suðureftir.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 07/02 kl. 06⁰⁰ – 08/02 06⁰⁰. Hitin í gjár: 3,7°
Minsti hiti máldur í februar: -11,0° -
Mesti hiti máldur í februar: +11,0°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,0 mm – mált frá 07/02 kl. 06⁰⁰ – 08/02 06⁰⁰.
Avfallið higartil í februar: 14 mm

javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo

VESTFALLSKYRRINDI

30. januar	Mánin næstur jørðini
5. februar	Seinna kvarter
13. februar	Mánin longst frá jørðini
14. februar	Tendring

Kelda: Almanakkin 2010

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	Suðuroyar-/Vágafirði sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmannasundi fp.	Vestmannasundi sp.	Mykinesfirði fp.	Mykinesfirði sp.	Nólsoyarfirði fp.	Nólsoyarfirði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp.	Hvannasundi fp.	Hvannasundi sp.	Fugloyarfirði fp.	Fugloyarfirði sp.
8. feb	02:23	14:48	01:23	13:48	01:38	14:03	04:23	16:48	05:23	17:48	00:38	13:03	-	12:03	02:38	15:03	03:38	16:03	02:08	14:33	03:23	15:48
9. feb	03:13	15:38	02:13	14:38	02:28	14:53	05:13	17:38	06:13	18:38	01:28	13:53	00:28	12:53	03:28	15:53	04:28	16:53	02:58	15:23	04:13	16:38
10. feb	04:01	16:25	03:01	15:25	03:16	15:40	06:01	18:25	07:01	19:25	02:16	14:40	01:16	13:40	04:16	16:40	05:16	17:40	03:46	16:10	05:01	17:25
11. feb	04:48	17:12	03:48	16:12	04:03	16:27	06:48	19:12	07:48	20:12	03:03	15:27	02:03	14:27	05:03	17:27	06:03	18:27	04:33	16:57	05:48	18:12
12. feb	05:34	17:56	04:34	16:56	04:49	17:11	07:34	19:56	08:34	20:56	03:49	16:11	02:49	15:11	05:49	18:11	06:49	19:11	05:19	17:41	06:34	18:56